Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
Standard hydrografi. Túrur nr. 1032
Tíðarskeið 1/9-8/9-2010

Fólk frá Havstovuni: Mourits M. Joensen og Regin Kristiansen.

Ábyrgd: Bogi Hansen

Endamál: Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum.

Reiðskapur: Seabird-CTD við rosettu, WP2-glúpur, útgerð at taka ein streymmátara upp við.

Um túrin: Vit fóru út hóskvøldið 1/9 kl.1900. Siglt varð eystur á støð N1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar norðureftir, vit tóku allan skurðin norður á 64°30N.
Tá liðugt var at taka støðir á skurði N, sigldu vit vestur á Føroyabanka, har vit byrjaðu skurð V við støð V19, og hildu so fram við skurðinum inn ímóti Trøllhøvda.
Tá liðugt var at taka støðirnar á skurði V, sigldu vit í Vesturhavið, har vit tóku ein streymmátara FASB upp, suður úr Mykinesi, á pos. 61°53,95N-007°34,86V, dýpið var 125 m.
Tá mátarin var komin innanborða, varð siglt suður á Munkagrunnin. Vit tóku skurð S av Munkagrunninum og móti Hetlandi, men bert til oljufeltið. Haðani sigldu vit so norður á skurð E, sum vit tóku inn móti Nólsoy.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekk væl.
Vit vóru aftur á Havnini sunnukvøldið 5/9 kl. 2230.

Prøvataking: Við Seabird CTDini tóku vit 50 støðir og saltprøvar á øllum. Við glúpinum tóku vit eisini 50 støðir.

Nær eru prøvarnir upparbeiddir: Saltprøvarnir verða analyseraðir í heyst.

Viðmerkingar:

16-9-2010 _____
Regin Kristiansen

Vend



Støðir og kósir á túri 1032